# Opin átala til Innlendismálaráðið

**Tíðindaskriv frá Føroya Kommunufelag**
*Rósa Samuelsen, formaður*



**Føroya Kommunufelag átalar at Innlendismálaráðið við stuðli frá ávísum fjølmiðlum er farið í herna mótvegis ávísum kommunum og kommunustøddum.**

Í farnu viku kom fram at tríggjar kommunur í Norðoyggjum høvdu ætlanir um at samstarva við Sunda og Eiðis kommunu á barnaverndarøkinum. Tað er ikki eiti á at henda samstarvsroynd, gjørd í sátt og semju ímillum fimm kommunustýri, fekk ilt í Landsstýrismenn, kommunupolitikarar og fjølmiðlafólk.

Tað var ikki ætlanin hjá Føroya Kommunufelag at leggja seg út í kjakið um hvussu kommunurnar skuldu skipa seg, hetta var jú álagt teimum at finna fram til sjálvar. Men ásetingin um at kommunurnar sjálvbodnar skuldi finna samstørv tykist nú bert at hava verið eitt skálkaskjól, fyri endaliga at avtaka kommunala sjálvræðið.

**Barnaverndarlógin**

Barnaverndarlógin ásetur at kommunur skulu finna saman í samstørv við einum fólkagrundarlagi ið telur í minsta lagi 1.500 íbúgvar. Við øðrum orðum hava allar kommunur, uttan Tórshavn, Klaksvík, Runavík, Tvøroyri, Sunda og Fuglafjarðar kommuna, fyri neyðini at finna í samstarv við aðrar kommunur fyri at røkka ásetta fólkagrundarlagnum uppá 1.500 íbúgvar.

Smærru kommunurnar í Norðoyggjum gjørdu av at sláa seg saman, at kanna møguleikarnar fyri samstarvi við aðrar kommunur. Fyri tryggja sær at kommunurnar høvdu veruligar valmøguleikar, vendu kommunurnar sær til Almanna- og Heilsumálaráðið við fyrispurningi um hvønn týdning ásetingin um, at kommunur skuldu verða landafrøðiliga samanhangandi, hevði. Svarið frá Almanna og Heilsumálaráðnum var greitt. Tá ið tunnil kom undir Leirvíksfjørð, var Eysturoyggin og Norðoyggjar at rokna sum landafrøðiliga samanhangandi. Bæði Klaksvíkin og hinar kommunurnar í Norðoyggjum hava síðani kanna møguleikarnar fyri samstarvi yvir um Leirvíksfjørð.

Aftaná at hava kanna møguleikarnar sum stóðu teimum í boði - samstarv við Klaksvíkina, samstarv við Fuglafjørð og Leirvík, Runavík og hinar kommunurnar í Eysturoynni og samstarvið Sunda og Eiðis kommuna - so hava tríggjar kommunur í Norðoyggjum avgjørt at arbeiða víðari við samstarvinum við Sunda og Eiðis Kommunu.

Kommunurnar hava í hesum førum eisini sent Almanna og Heilsumálaráðnum ítøkiligan fyrispurning um hetta samstarvið, og hava fingið at vita at hetta samstarvið eisini verður góðtikið.

Sambært § 4 stk. 1 í barnaverndarlógini er tað Landsstýrismaðurin í Almanna og Heilsumálum sum skal góðkenna Kommunala samstarvið.

**Innlendismálaráðið**

Men at tríggjar kommunur í Norðoyggjum umhugsaðu annað samstarv enn Klaksvíkini, fekk ilt í Landsstýrismannin kommunumálum. Hann hevði brádliga saman við Landsstýrismanninum í almanna og heilsumálum evsta vald á økinum, og hetta hóskaði als ikki inn í eina størri ætlan viðvíkjandi kommunusamanleggingum sum Jógvan við Keldu hevur. ( Sí viðtalu í dimmalætting 16. november) Eftir øllum at døma ein fjald dagsskrá sum felagið ongan kunnleika hevur til.

Um so er at Innlendismálaráðið arbeiðir við eini ætlan um leggja kommunurnar saman í størri kommunalar eindir, so er at handla samsvarandi, og ikki brúka ásetingar í eini barnaverndarlóg sum jarnbrot til røkka málinum.

Skal hinvegin verða nakað høpi í at tosa um sjálvboðið samstarv ímillum kommunir, so ber ikki til at áseta landafrøðiligu rammurnar fyri samstarvinum frammanundan. Tað svarar til fólkaræðið handan gamla jarntjaldið, har øll høvdu valrætt, men bert ein valmøguleika.

**Innlendismálaráðið enn einaferð**

Samstundis sær út til at Innlendismálaráðið rættuliga er farið í herna ímóti smærri kommununum. Einki skil er í roknskapinum í smærru kommununum, sigur embætismaður í innlendismálaráðnum ( Dimmalætting 7 november). Arbeiðsbólkur er settur at gera felags roknskaparreglur, og hesin verður liðugur 1 mars 2006 (Dimmalætting 8 november).

Kommunurnar hava bíða eftir hesum felags roknskaparleisti í fleiri ár, men arbeiðið var ikki komið langt ávegis tá seinasti fundur var í mars mánaði í ár, og síðani er einki hent. Tað er landsmynduleikin ið liggur omaná hesum málið og ikki kommunurnar.

Ta sær út til kommunustøddin fær skylduna fyri líkt og ólíkt í hesum døgum. Bara eindirnar vera størri, til dømis eindir sum Leirvík Fuglafjørður, Klaksvík og restin av norðoyggjum ( Citat Jógvan við Keldu Dimmalætting 10 november), so kunnu trupulleikar viðvíkjandi felags roknskapar reglum og aðrir trupulleikar við, loysast at kalla beinanvegin.

At Innlendismálaráðharrin droymur um eina stórkommunu sum fevnir um Norðoyggjar og eystara part av Eysturoynni er kunnugt fyri teim flestu, men at taka sjálvræðið frá ávísum kommunum fyri røkka hesum málið kann ikki góðtakast.

Viðvíkjandi óskili í roknskapi so er eftir okkara tykki eingin beinleiðis samanhangur ímillum støðd og óskil. Ávíst óskil er hjá nøkrum smáum eins og hjá stórum kommunum. Men ábyrgdina av at gera felags roknskapar reglur liggur hjá landinum.

**At enda**

At Dimma ákærur Kommunupolitikarar bert at hugsa pengar og ikki um mannalagnur ( Leiðarin 16. november), sigur væl meira um greinskrivaran enn um kommunurnar. Kommunurnar hava gjørt eitt megnararbeiði fyri at gerast klárar at yvirtaka barnaverndarøkið 1. januar 2006. At onkrir trupulleikar hava stungið seg upp, var ikki meira enn væntandi. Men trupulleikar eru til fyri at loysa, og tað eru teir vónandi eisini 1 januar 2006.

# Tunnilsgjøld og vegskattur spenna úr kr. 3000 til kr. 15.000 fyri somu bilar

**Sv. Aage Ellefsen**



Væl av grenji hevur verið at hoyra í samband við at vegskatturin skal hækkast.

Tað er væl skiljandi, tí øll hava nokk av dagligum útreiðslum.

Fyri okkum í Vágunum er vegskattarokningin til landskassin ikki hon, sum stressar og tyngir mest.

Tað gera hinvegin, tey ógrundaðu høgu vegskattagjøldini, vit rinda til fæsta sambandi um Vestmannasund. Tí meðan onnur í Føroyum sleppa við at gjalda úr kr. 3000 til landskassan, so skulu tey, sum koyra dagliga um sundið, og sum sleppa bíligast í Vágunum í minsta lagi gjalda kr. 12.000 til tunnilin umframt kr. 3.000 til landskassan ella tilsamans kr. 15.000 árliga!

Tað er vælkent og vælprógvað, at leiðslan fyri P/f Vágatunnilin als onga føling hevur havt og ei heldur hevur, fyri hvussu hendan íløgan skal tæna teimum, hon varð ætlað til, sum frægast. Monopolmenn, sum teir allir eru, hava teir sjálvsagt ilt at fáa eyga á kundanna tørv, men virka tvørturímóti í teirra dagligu sannføring, at tað eru viðskiftafólkini, sum skulu tillaga seg og ikki tænastan, ið veitt verður.

Harragud viðskiftafólkini hava jú einki val, so tey skulu bara halda munn!

**Ferðslan til Vestmanna og Vágar**

Tað er landsstýrið/løgtingið, ið eiga partafelagið Vágatunnilin, og sostatt eru tað landspolitikkararnir, ið hava hægstu ábyrgdina av tunnilsfyrisitingini.

Ì sambandi við ein fyrispurning á løgtingi herfyri kom fram, at ferðslan millum meginøkið og Vestmanna og meginøkið og Vágar er á sama støði - nevniliga einir 1000 til 1100 bilar dagliga.

Ì Vágunum búgva uml. 2,5 ferðir so nógv fólk sum í Vestmanna. Harafturat hava vit flogvøllin í Vágunum, og um hann ferðast sum kunnugt eini 500 fólk dagliga, so við atliti til virksemi í Vágunum, átti dagliga ferðslan millum Vágar og meginøkið náttúrliga at ligið omanfyri 3000 akfør.

Tað hevur við øðrum orðum eydnast tunnilsleiðsluni við sínum príspolitikki, at halda ferðslutíttleikan niðri á einum triðingi av sjálvsagda støðinum. Og sagt við øðrum orðum, fáa vit - orsakað av tunnilsleiðsluni - einans ein triðing av tí ágóðanum til høldar, sum vit áttu at fingið burtur úr tunnilsíløguni!

Tað er harmiligt at landspolitikkararnir, hóast teir ferð eftir ferð eru gjørdir varugur við viðurskiftini, ikki lata við seg koma!

**Verður Annfinn Kallsberg bjarganin?**

Nógv av okkum hava trúð og vóna, at viðurskiftini mundu fáa eina broyting, so skjótt Norðoyartunnilin varð liðugur.

Tíansbetur tykist nú, at soleiðis verður.

Fyri kortum boðaði Annfinn Kallsberg frá, at hann fór at virka fyri, at vegskatturin til landskassan skuldi brúkast at afturrinda og reka m.a. undirsjóvartunnlarnar, og at nýtslugjøldini soleiðis skulu falla burtur.

Hettar eru góð og rímilig tíðindi. Sjálvsagt skulu allir føroyingar - í hvussu so er øll í meginøkinum - rinda tað nú nógv víðkaða veganeti. Tað er jú einsvæl koyrandi úr Eysturoy og Streymoy til Norðoyggjar og Vágar, sum tað er koyrandi hinvegin!

Men, eitt er, hvat Annfinn Kallsberg vil virka fyri, og annað er, hvat er møguligt - nú landskassin orsakað av teirri burturvið stóru almennu útreiðsluøkingini seinastu valskeiðini, er í fíggjarligari trongstøðu!

Tí skal mín áheitan vera, at eigararnir av Vágatunnlinum - t.e. løgting og landsstýri - beinanvegin áleggja leiðsluni fyri tunnilsfelagnum, at seta niður øll nýtslugjøldini - í hvussu so er - niður í helvt! Hvørt hetta verður gjørt í sambandi við broytingina í lóg um vektgjøld ella annað uppskot, er eins feitt fyri okkum!

Og hvørt hetta hevur við sær lægri ella hægri inntøkur hjá felagnum, kann bert tíðin vísa. Helst fer ferðslulopið, sum kemur orsakað av lægra gjaldinum, at føra við sær munandi inntøkuhækkingar.

Men eitt er givið, og tað er, at lækkingin als ikki fær stórvegis skaðiligt árin á felagsraksturin. Heldur tvørturímóti!

Tí hvørjum líkist tað, at krevja inn 30 mió kr. árliga, fyri at reka 4,7 km av nýggjum koyrivegi, tá rentur og avdráttir kosta niðan fyri 15 mió.

Hetta rýkur av monopolhugsjón, so tað stendur eftir, so her má beinanvegin takast annað skinn um bak!

# Man Fólkaflokkurin hava broytt hugburð?

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Fólkafloks tingmenn siga nú, at teir halda tað ikki vera rætt, at lóggeva fyri ella ímóti einstøkum bólkum í Føroyum.

Hetta má eitast at verða stórar nýggheitir, tí so leingi eg havi fylgt við í politikki, so hava fólkafloks tingmenn bert hugsa um eitt og tað er at lóggeva fyri seg sjálvan og síni.

Formaðurin í tingbólkinum vil ikki stuðla avgjalds hækking av tubbaki tí tað rakar bert ein bólk, roykjarar. Gud viti um maðurin sjálvur er roykjari?

Allir fólkafloks tingmenninir (uttan ein) vilja ikki stuðla uppskotinum um, ikki at gera mun á fólki vegna sexuellu sannføring. At vit skriva ár 2005 er líkamikið, nú skulu orð, ið eru skriva fyri fleiri túsund árum síðani, misbrúkast og hevjast yvir allar lógir.

Hava fólkafloks tingmenn gloymt, at tað eisini er skriva fyri fleiri túsund árum síðani, at um maður neyðtekur kvinnu, so skal hann gjalda bót til pápan og gifta seg við kvinnuni?

Fólkafloks formaðurin er ímóti hækkingini av vektgjaldinum á bilar og er tað kanska tí bileigarar er ein serstakur bólkur í Føroyum, líkasum roykjarar og samkynd. Ella er tað tí teir koyra í dieselbilum? Annars kunnu fólkafloks tingmenn lætt verja seg sjálvan og síni, við at hækka koyrifrádráttin.

**Háláðir eftir hárinum**

Eitt kann mann ikki taka frá Fólkaflokkinum og tað er, at teir dugdu væl at hála Tjóðveldis- og smáu flokkarnar eftir hárinum í fyrrverandi samgongu og teir hava ikki mist taki í hesari samgonguni, tí teir hála so listuliga bæði Sambands- og Javnaðarflokkin eftir hárinum.